ATLANTIC AIRWAYS
SUMMARKAPPINGIN '09

**Stóra summarkappingin hjá Sosialinum**

Send inn og vinn nógvar flottar vinningar

Vika 25:
Leiðin til London

8 síður við spennandi tilfari um summar

# Vikuskiftistúrur til **London**

**Dagur 1 av 4**

Hvat er betur enn ein vikuskiftistúrur til London við vinkonuni? Vit eru farnar til London hetta vikuskiftið við teirri vón at uppliva ymiskt, sum vit ikki hava møguleika til í okkara annars so deiliga landi. Vit vóna at uppliva ymiskt, bæði hvat viðvíkur mentan, søgu, shopping, býarlívi og ikki minst tey áhugaverdu og fjølbroyttu matstøðini, sum tann sera metropoliski høvuðsstaðurin hevur at bjóða. Møguleiki er fyri at lesa um okkara vikuskiftistúr í Sosialinum hvønn dag í vikuni, og vónandi er tað ein inspiration til aðrar føroyingar sum leingast eftir nýggjum og øðrum upplivingum.

## Føroyar beinleiðis til London

Atlantic Airways hevur flogið til London í nøkur ár. Nú er so møguleiki at flúgva beinleiðis til London uttan millumlending í Skotlandi, sum tað var fyrr. Føroyingar eru eitt sindur ókendir í Bretlandi, og sostatt er tað neyvan tað fyrsta staðið ein hugsar um, tá ið frítíðin skal leggjast til rættis. Tó so, so eru møguleikarnir óteljandi, hvat upplivingum viðvíkur.

## London

Høvuðsstaðurin í Bretlandi, London, liggur bara ein góðan ½ tíma frá Stansted Airport, flogvøllinum, sum Atlanic Airways samstarvar við. Umframt eina deiliga frítíð í London, so letur flogvøllurin Stansted upp fyri óteljandi øðrum frítíðarmøguleikum.

## Lágprísflogfeløg

Flogvøllurin í Stansted er kendur fyri at hava fleiri lágprísflogfeløg, so sum Easy Jet, Ryan Air, Thomson Flight við øðrum. Hesi flogfeløg nýta Stansted, og har eru ein hópur av ferðamálum at velja ímillum, um ein ynskir at fara víðari út í heim fyri ein sámuligan prís. Meira upplýsingar og prísir fyri hesar ferðir finnast á heimasíðuni hjá Stansted Airport, www.stanstedairport.com ella við at fara beinleiðis inn á heimasíðuna hjá flogfelagnum og velja flogferðir frá Stansted Airport. Les meira um Stansted Airport á næstu síðu.




**Atlantic Airways flýgur nú beinleiðis til Stansted Airport, London**



**Easy Jet er eitt av teimum mongu lágprísflogfeløgunum, sum flúgva til og frá Stansted Airport**




**Stanstead hevur nógv ymiskt at bjóða teimum ferðandi, so sum matstovur og handlar**


Melda teg til Club Atlantic og

**VINN FERÐASEÐLAR**



og fá sertilboð sendandi við teldupostí

Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.

**Melda til á: www.atlantic.fo**

Tel 34 10 00 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo